# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*Hvussu kunnu vit bjóða okkum fram á arbeiðsmarknaðinum, tá vit ikki vita, um vit í morgin ella næstu viku hava stuðul?*

*Turid Askham*

## Stuðul ella heftur tíðindaflutningur

Fríggjakvøldið setti Dagur & Vika sjóneykuna á bløðini og festivalar. Ivi varð sáddur um, hvørt fólk fáa óheft tíðindi, tá bløðini samstarva við festivalar. Eisini staðfesti ein viðmerkjari, at her er talan um eina gongd, har fjølmiðlar kasta saman við vinnuligum áhugamálum til tess at fáa endarnar at røkka saman.

Tað er avgjørt áhugavert at reisa spurningin, um tíðindi verða óheft, tá fjølmiðlar og vinnulív í ov stóran mun ganga hond í hond, men samanberingar skulu valdast.

Tað eru eftirhondini fleiri á síðani, at vit her á blaðnum tóku ta tilvitaðu støðu, at vit vilja gera meira burtur úr tónleikinum – hesi mentanargrein, sum var rættuliga fórfjónað í okkara samfelag, og sum als ikki hevur fingið ta sømd, hon hevur uppiborið.

Og væl er komið burtur úr hesi árini. Stór tiltøk sum Prix Føroyar og allir festivalarnir eru vorðin føst og afturvendandi tiltøk. Víðagitin útlendsk nøvn koma hendanvegin, og okkara egnu fólk smæðast ikki burtur í øðrum londum, har tey eisini eru frammaliga og onkuntíð vinna tónleikakappingar.

Men at taka samstarvið millum bløðini og festivalarnar sum dømi um, at fjølmiðlar ganga hond í hond við vinnulig áhugamál, tað er at skjóta spurvar við kanónum. Og tá sagt verður, at Sosialurin er sponsor hjá einum festivali, so kunnu vit líka minna á, at vit eru sponsorar hjá ikki færri enn á fýra ymiskum festivalnum:

Asfalt, sum var í Tórsgøtu í Havn – har Miðlahúsið eisini hýsti fleiri konsertum, Jóansøkufestivalinum, Summar Festivalinum og Fjarðafestivalinum – ein gospelfestivalur í Kelduni í Skálafirði seinanst í august.

Tað sum umræður hjá okkum í slíkum førum er at vera har, sum nakað hendir. Tað er ikki ein spurningur, um vit fáa so og so nógvar pengar burtur úr hesum ella hasum festivalinum, men meira tað at vit fáa markerað okkum sum miðil – samstundis sum vit seta fokus á tónleikin.

Vit vilja skriva um tónleik í breiðastu merking. Vit vilja fegin dekka hetta øki breitt, bæði harðan rokk og gospel. Vil vilja eisini dekka øll tónleikatiltøk og allar festivalar væl og virðiliga, um vit eru sponsorar ella ikki.

**Sosialurin**

# Ein fornermaður Thomas Arabo

**REIDAR NÓNFJALL**



Thomas Arabo (TA), fyrrverandi politikari og stjóri á Strandferðsluni, hevur eina viðmerking í Sosialinum tann 6. juli 2006, um eitt úttalilisi frá mær um, hvussu gamla ferjan Smyril ella Morten Mols varð keyptur til landið.

Tað er ótrúligt, hvat nøkur menneskju kunnu reagera uppá og gera tað uttan tann minsta sjálvkritikk og at síggja bjálkan í sínum egna eyga. TA hevur ilt av, at eg eri nøgdur og ikki sørt errin av nýggja Smyrli og heldur, at tað er sjálvrós. Makan til frekleika skal ein leita leingi eftir. Eg kann siga TA, at eg, so at siga, ongantíð eri vorðin nevndur í sambandi við nýggja Smyril, sjálvt um eg í umleið 4 ár hevði projektábyrgdina av nýggju suðuroyarferjuni í fyrireikingar- og projekteringstíðini, og heilt fram til undirskriving av byggisáttmála. Harafturímóti hevur TA víst seg fram í Sosialinum og SVF ferð aftan á ferð og reypað og róst avgerðini um at keypa gamla Morten Mols. Beint eftir at nýggi Smyril kom til landið var TA aftur frammi í Sosialinum um, at talan var um eina feilíløgu – TA so líkt slongt út í leysa luft og órealistikst mett. Hetta var eitt niðurgerandi álop á verkætlanina um nýggja Smyril.

Tí haldi eg, at tað er atburðurin og sjálvrósið frá TA um gamla Smyril, sum í hesum sambandi, stinkar langt burtur og er merkt av undirlutakenslu - og av sosialistiskum undirtónum, tá teir eru ringast og frá tíðini áðrenn »múrurin« fall. Tað er ikki meira enn náttúrligt, at ábyrgdarhavandi fólk aftan fyri nýggja Smyril eisini sleppa framat alment at greiða frá søguni aftan fyri verkætlanina.

Blaðmaðurin ringdi til mín og helt, at hetta vera eina góða nýggjheit at bera fram alment - tað, at nýggi Smyril hevur fingið eina altjóða virðisløn. So eg havi ikki gjørt minsta innsatsin fyri at koma framat í fjølmiðlunum í hesari konkretu samrøðu. Hetta kann jú ikki samanberast við, at m.a. TA og javnaðarpolitikarar í nógv ár hava brúkt og misbrúkt Sosialin til at lufta síni politisku sjónarmið.

Eg eri so »heppin« at hava innlit í og kom í ta støðu, saman við øðrum, at rudda upp í øllum tí svansi og rotinskapi, sum Føroya land og kommunurnar vórðu stýrdar útfrá í gjøgnum 1970´ini og 1980´ini og sum øllum kunnugt endaði við einum búskaparligum skrædli í 1991. Eg slapp eisini at rudda upp í 2 tey fyrstu árini á Strandferðsluni og síðan í 4 ár at menna stovnin og tess flutningstænastur. TA fær meg aldrin samanumtikið at halda gott um serliga nógv av tí, sum hendi politiskt í t. d. 1980´unum. Henda ferja ella líknandi menning var eisini við vissu komin uttan TA.

TA tosar um at reingja fortíðina í Føroyum (her nokk fortíðina hjá føroyskum politikki og føroyskum politikarum). Her kann eg siga, at tað ólukkuliga er, at ongar vísindarligar greiningar eru gjørdar av nýsøguligu gongdini í Føroyum, tvs. tíðina eftir annan heimsbardaga og til í dag. Varð hetta gjørt, er nógv, sum hevði komið undan kavi av nýggjum skelkandi upplýsingum um politisku vanstýringina av okkara landi í t. d. 1980´unum, og sum fór fram fyri bara heilt fáum árum síðani.

# Tá vit vita hvørji rættindi vit hava verða vit trygg!

**TURID ASKHAM**



**Stuðulsfólkaskipanin:** Nei, Petra, fyrrenn tú hevur tryggjað okkum, at vit fáa stuðul í heimið ella við á sjúkrahúsið, tá barnið er sjúkt, føla vit okkum ikki trygg við nýggju skipanina. Hvørja ferð vit spurdu teg um eitthvørt á kunnandi fundinum var svarið bara, at tað kunnu tit ikki lova. Kanska eru ætlaninar tit hava góðar, men kunningin hevur ikki skapt tryggleika, tvørturímóti! Og tú sigur akkurát tað sama í fjølmiðlunum, tit kunnu ikki lovað nakað!!

Tá man hevur so tarnað, sjúk børn, sum vit, má tryggleikin vera í lagi! Fyri okkum og ikki minst fyri barnið.

Hvussu kunnu vit bjóða okkum fram á arbeiðsmarknaðinum, tá vit ikki vita, um vit í morgin ella næstu viku hava stuðul?

Eg gleði meg til stuðulsskipanin verður betur, tá vit vita, at vit eisini fáa stuðul í heiminum og á sjúkrahúsinum.

Tit siga, at sjúkrahúsið hevur ábyrgd av børnunum har, tað hava tey eisini í tí viðgerð, barnið skal hava, men »normal« børn hava síni foreldur við. Hjá teimum er tað kanska einaferð í lívinum, at tey koma á barnadeildina, so tað er lætt hjá arbeiðsgevara at skilja. Men hjá okkum er tað fleiri ferð um árðið og leingi í senn. At vera har 24 tímar um døgnið t. d. 14 dagar út í eitt, ber menniskjaliga slett ikki til. Tann stuðul vit hava runt døgnið má avlasta okkum har eisini. Nokta tit hesum, blaka tit bara bóltin víðari til sjúkrahúsið, og taparin er familian.

Tit kunnu ikki rokna við, at vit orka at blíva við at gera tykkara arbeiði.

Lógarsmíð gerst ikki við at kæra og ganga eftir kæruavgerum. Nei, tú má pressa á politikarar at fáa reglugerðina í rætt lag. Tá vit vita, hvørji rættindi vit hava, nýstani tá verða vit trygg!

Í einum slíkum vælferðarsamfelag ber ikki til, at tilvildin ræður, sum hon ger í dag.

Í dag avhangur avgerðin av, hvør málsviðgerin er, tað finnast fleiri sløg av málsviðgerum; ein, ið dugir væl at síggja tørvin hjá familiuni og dugir væl at bera tað víðari til leiðsluna á Almannastovuni – annar, ið somuleiðis dugir at síggja tørvin, men dugir ikki so væl at málbera seg – ein triðji, ið ikki skilir støðuna, men dugur kanska væl at málbera seg – ein fjórði, ið heldur, at alt kostar so nógv og tí ikki torir at bera ynskini víðari til leiðsluna – ein fimti, ið er øvundsjúkur inn á tær stóru upphæddir, hesar familiur »fáa/kosta« og soleiðis kann eg blíva við, akkurát so ymisk vit menniskju eru, eru eisini málsviðgerarar, tí mugu reglur til – beinanvegin! Tað sigur seg sjálvt at málsviðgerin verður ymisk!

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.